FOLKETINGETS
OMBUDSMAND



# Eftirlitsvitjan og viðgerð av persónsupplýsingu



# Eftirlitsvitjanir frá umboðsmanninum

**Hvar fer umboðsmaðurin á eftirlitsvitjanir?**
Umboðsmaðurin vitjar serliga støð, har fólk eru ella kunnu verða frátikin frælsi. Tað kann t.d. vera fongsul, sosialir bústaðir, bústovnar fyri heimansett børn og ung uttanfyri heimið og psykiatriskar deildir.

**Hví eftirlitsvitjanir?**
Endamálið við eftirlitsvitjanum er at hjálpa til at tryggja, at brúkarar verða viðfarnir við virðing og umhugsni í samsvari við teirra rættindi.

**Hvør kemur á vitjan?**
Starvsfólk hjá umboðsmanninum taka lut í vitjanini. Flestu av starvsfólkunum hjá umboðsmanninum eru løgfrøðingar. Ein barnaserfrøðingur luttekur í eftirlitsvitjanum í barnaøkinum.

Vanliga er ein lækni frá DIGNITY – Danish Institute Against Torture – eisini við. Ofta er ein serfrøðingur í mannarættindum frá danska instituttinum fyri mannarættindi við.

**Hvussu fer ein eftirlitsvitjan fram?**
Vitjanartoymið hittir leiðsluna á vitjanarstaðnum og hevur samrøður við nakrar brúkarar og ein part av starvsfólkunum. Vitjanartoymið sær eisini vitjanarstaðið.

Áðrenn vitjanin er av, tosar vitjanartoymið við leiðsluna um umstøðurnar á vitjanarstaðnum, og um tað møguliga er okkurt, sum umboðsmaðurin viðmælir vitjanarstaðnum at broyta.

**Hvat hendir eftir vitjanina?**
Umboðsmaðurin skrivar eitt brævum vitjanina. Brævið verður sent til vitjanarstaðið við eini áheitan um, at brúkararar verða kunnaðir um tað. Brævið verður eisini sent til viðkomandi myndugleikar og lagt út á heimasíðuna hjá umboðsmanninum.

Onkuntíð verður vitjanartoymið varugt við viðurskifti, sum umboðsmaðurin síðan kannar nærri.

Tú finnur brøv frá umboðsmanninum um vitjanir og aðrar upplýsingar um eftirlitsvitjanir á heimasíðu umboðsmansins, ombudsmanden.dk/tilsyn.



FOLKETINGETS OMBUDSMAND

Fólkatingsins umboðsmaður er valdur av fólkatinginum. Hann skal elva til, at fyrisitingin virkar lógliga og fylgir góðum fyrisitingarsiðum. Soleiðis verjir hann borgaranna rættindini í møtinum við myndugleikarnar. Umboðsmaðurin viðger klagur frá borgarum. Hann ger eisini kanningar av sínum eintingum og fer á eftirlitsvitjanir. Umboðsmaðurin kann koma við tilmælum til vitjanarstøðini og myndugleikarnar.

DIGNITY
DANSK INSTITUT MOD TORTUR

DIGNITY – Dansk Institut Mod Tortur er ein sjálvsognarstovnur. DIGNITY arbeiðir bæði í Danmark og uttanlands fyri at forða og fyribyrgja pínslu og aðra ræðuliga, ómenniskjansliga ella vanvirðandi viðferð á stovnum, har fólk eru frátikin frælsi. DIGNITY leggur fólkatingsins umboðsmanni ráð í læknalig viðurskifti í sambandi við eftirlitsvitjanir.

INSTITUT FOR MENNESKE RETTIGHEDER

Institut for Menneskerettigheder er ein sjálveigandi ríkisstovnur og er tjóðarmannarættindastovnurin í Danmark. Í Danmark gevur stovnurin stjórnini, fólkatinginum, ráðunum og myndugleikunum ráð um mannarættindi. Stovnurin gevur fólkatingsins umboðsmanni ráð um mannarættindi í sambandi við eftirlitsvitjanir.

# Viðgerð av persónsupplýsingum undir eftirlitsvitjanir

Umboðsmaðurin, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder viðgera persónsupplýsingar, sum eru viðkomandi fyri at útinna eftirlitsvitjanir. Upplýsingarnar koma serliga frá vitjanarstaðnum og brúkarunum av vitjanarstaðnum.

Upplýsingarnir kunnu t.d. koma fram í yvirlitum yvir brúkarar av vitjanarstaðnum, yvirlitum yvir valdsnýtslu og tvingsli á staðnum, og dømi um skjalfesting og frágreiðingar á staðnum um vald ella tvingsli.

Persónsupplýsingar, sum verða viðgjørdir í sambandi við eftirlitsvitjanir, verða skrásettir í KT-skipanum hjá umboðsmanninum, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder.

**Hvørjar upplýsingar verða skrásettar?**
Almennar upplýsingar verða skrásettar, t.d.

- navn og bústaður (eyðmerkingarupplýsingar).

Aðrar upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri ta ávísu eftirlitsvitjanina, verða eisini skrásettar.

Tað kann eitt nú vera upplýsingar um

- sosialar umstøður
- fíggjarligar umstøður
- familjuviðurskifti
- starvsviðurskifti.

Harafturat kunnu viðkvæmar upplýsingar verða skrásettar, t.d. um

- heilsu
- fólkaslag og tjóðbólkaeyðkenni (etnicitet).

Upplýsingar um brotsgerðir kunnu eisini verða skrásettar.

CPR-nummur koma ofta fyri í yvirlitinum yvir t.d. valdsnýtslu ella tvingsli á einum vitjanarstaði. Harafturat verða CPR-nummur í summum førum skrásett fyri at kunna eyðmerkja borgarar og møguliga seta seg í samband við teir.

**Rættindi**
Fólk, sum verða skrásett hjá umboðsmanninum, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder, hava rætt til at vita

- *at* upplýsingar um tey eru viðgjørdir
- *hvørji sløg* av upplýsingum eru viðgjørd
- *hvar* upplýsingarnar koma frá (um tey ikki koma frá skrásetta).

Tann skrásetti kann eisini biðja um at síggja upplýsingarnar.

Sum skrásettur persónur hevur tú rætt til at biðja um, at upplýsingarnar verða beindar á rætta leið (t.e. rættaðar ella fullfíggjaðar) ella strikaðar, um hildið verður, at upplýsingarnar eitt nú eru skeivar ella geva eina órætta mynd. Tú kanst eisini hava rætt til at mótmæla viðgerðini av tínum persónsupplýsingum.

Umboðsmaðurin, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder hava skyldu at taka støðu til umbønirnar frá skrásetta um rætting, striking ella mótmæli.

Sí eisini vegleiðingina hjá Datatilsynet um rættindi hjá skrásettum (datatilsynet.dk).

**Tagnarskylda og at geva upplýsingar víðari**
Starvsfólkini hjá fólkatingsins umboðsmanni, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder hava tagnarskyldu viðvíkjandi trúnaðarupplýsingum, tey fáa í sambandi við vitjanir.

Teir tríggir stovnarnir kunnu veita hvør øðrum upplýsingar til nýtslu í vitjanini ella framhaldsviðgerðini.

Tey kunnu eisini noyðast at geva upplýsingar víðari í sambandi við viðgerðina av umbønum um innlit. Umboðsmaðurin kann harafturat noyðast at geva upplýsingar víðari, t.d. tí at ein ella fleiri myndugleikar skulu kunnast ella gera viðmerkingar til upplýsingar, sum eru fingnar í sambandi við eftirlitsvitjanir.

**Hevur tú spurningar?**
Um tú hevur spurningar um eftirlitsvitjanina ella tíni rættindi, ert tú vælkomin at seta teg í samband við umboðsmannin.

Tú kanst eisini seta teg í samband við umboðsmannin, um tú vilt hava innlit ella annað í eitt mál, har upplýsingar um teg eru skrásettar.

Umboðsmaðurin sendir tína áheitan til DIGNITY ella Institut for Menneskerettigheder, um tey skulu svara tær. Tú kanst eisini seta teg í samband við tey.

**Samband**
Fólkatingsins umboðsmaður
Gammeltorv 22
1457 København K
M: post@ombudsmanden.dk
T: +45 33 13 25 12

**Rætt til klagu**
Tú hevur møguleika at klaga til Datatilsynet um viðgerðina av upplýsingum um teg hjá umboðsmanninum, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder.

**Samband**
Datatilsynet
Carl Jacobsens Vej 35
2500 Valby
M: Dt@datamótisYnet.Dk
T: +45 33 19 32 00

Tú kanst skriva til Datatilsynet frá tínum talgilda postkassa á Borger.dk.

**Felags dátuábyrgd**
Sambært grein 26 í dátuverndarreglugerðini hava fólkatingsins umboðsmaður, DIGNITY og Institut for Menneskerettigheder eina felags dátuábyrgd.

Hvør partur hevur ábyrgd av at halda reglunum í dátuverndarreglugerðini og dátuverndarlógini um viðgerð av persónsupplýsingum. Partarnir hava m.a. hvør sær ábyrgd av at tryggja, at hesar reglurnar í dátuverndarreglugerðini verða hildnar:

- Reglurnar um rættindi hjá skrásettum sambært grein 12-23. Um ein umbøn ella áheitan, t.d. ein klaga, snýr seg um viðurskifti, sum ein annar av pørtunum hevur ábyrgd av, verður hon beind til tann, sum hevur ábyrgdina, skjótast gjørligt.
- Reglurnar um trygd í viðgerð og fráboðan um brot á dátutrygdina sambært grein 32-34.
- Reglurnar um dátulista í grein 30.

Partarnir hava hvør sær ábyrgd av, at tað er eitt galdandi grundarlag fyri viðgerð, og at grundarlagið fyri viðgerð er lýst í upplýsingartilfarinum til skrásetta.

*Finn meira kunning um dátuverndarreglugerðina og dátuverndarlógina á heimasíðuni hjá Datatilsynet, datatilsynet.dk.*

## Viðgerð av persónsupplýsingum hjá fólkatingsins umboðsmanni

Uppgávurnar og virksemið hjá umboðsmanninum er ásett í umboðsmannalógini. Dátuverndarreglugerðin og dátuverndarlógin stýra samstundis viðgerðini hjá umboðsmanninum av persónsupplýsingum.

Grundarlagið fyri viðgerð av persónsupplýsingum hjá umboðsmanninum er umboðsmannalógin (lóg um fólkatingsins umboðsmann, ber saman lógarkunngerð nr. 349 frá 22. mars 2013), dátuverndarreglugerðin (2016/679/EU) grein 5, 1. stykki, grein 6, 1. stykki, litra c og e, grein 9, stykki 1, ber saman 2. stykki, litra f, grein 10 umframt dátuverndarlógin (lóg nr. 502 frá 23. mai 2018) § 5, 1. og 2. stykki, § 6, 1. stykki, § 7, 1. stykki, § 8, 1. og 2. stykki, § 9, 1. stykki, og § 11, 1. stykki.

### Varðveitsla

Upplýsingar verða goymdar so leingi, sum neyðugt er fyri at loysa uppgávurnar hjá umboðsmanninum, eisini fyri at kunna leita í líknandi málum.

### Samband

Fólkatingsins umboðsmaður
Gammeltorv 22
1457 København K
M: post@ombudsmanden.dk
T: +45 33 13 25 12

### Dátuverndarráðgevi hjá umboðsmanninum

M: dpo@ombudsmanden.dk
T: +45 33 13 25 12 (umvegis móttøkuna hjá umboðsmanninum)

## Viðgerð av persónsupplýsingum hjá DIGNITY

Grundarlagið fyri viðgerðina av persónsupplýsingum hjá DIGNITY er dátuverndarreglugerðin (2016/679/EU) grein 5, 1. stykki, grein 6, 1. stykki, litra c og f, grein 9, stykki 1, ber saman 2. stykki, litra f, ber saman grein 6, stykki 1, litra f, grein 10 umframt dátuverndarlógin (lóg nr. 502 frá 23. mai 2018) § 5, 1. og 2. stykki, § 6, 1. stykki, § 7, 1. stykki, § 8, 3. stykki, 2. punkt, og 5. stykki, ber saman § 7, 1. stykki, og § 11, 2. stykki, nr. 4, ber saman § 7, 1. stykki.

Viðgerðin hjá DIGNITY av persónsupplýsingum er grundað løglig áhugamál í at kunna veita stuðul til eina virðiliga og umhugsna viðgerð av brúkarum í samsvari við teirra rættindi.

### Flutningur av persónsupplýsingum til triðjalond

Vanliga fer DIGNITY ikki at flyta persónsupplýsingar til móttakarar í triðjalondum. Hetta kann tó vera neyðugt í ávísum førum, t.d. í sambandi við nýtslu av ávísum KT-skipanum. Slíkar flytingar verða undirgivnar neyðugu trygdartiltøkunum, sbr. almennu dátuverndarreglugerðina (2016/679/EU) grein 46, 2. stykki, litra c (vanligar sáttmálaavgerðir). Tú kanst seta teg í samband við DIGNITY fyri at fáa meira kunning um flutning av persónsupplýsingum til triðjalond.

### Varðveitsla

Upplýsingar verða varðveittar, inntil málið hjá DIGNITY viðvíkjandi eftirlitsvitjanini er liðugt. DIGNITY goymir síðan síni egnu frásøgn frá eftirlitsvitjanini, men í dulnevndum sniði.

### Samband

DIGNITY – Dansk Institut Mod Tortur
Bryggervangen 55
2100 København K
M: gdpr@dignity.dk
T: +45 33 76 06 00

## Viðgerð av persónsupplýsingum hjá Institut for Menneskerettigheder

Grundarlagið fyri viðgerðina av persónsupplýsingum hjá Institut for Menneskerettigheder er dátuverndar-reglugerðini (2016/679/EU) grein 5, 1. stykki, grein 6, 1. stykki, litra c og e, grein 9, stykki 1, ber saman 2. stykki, litra f, grein 10 umframt dátuverndarlógin (lóg nr. 502 frá 23. mai 2018) § 5, 1. og 2. stykki, § 6, 1. stykki, § 7, 1. stykki, § 8, 1. stykki, § 9, 1. stykki, § 11, 1 stykki.

### Varðveitsla

Upplýsingar verða goymdar, inntil tær verða fluttar í skjalasavn sambært reglunum í skjalasavnslógini.

### Samband

Institut for Menneskerettigheder
Wilders Plads 8K
1403 København K
M: info@humanrights.dk
T: +45 32 69 88 88

### Dátuverndarráðgevin í stovninum

M: dpo@humanrights.dk
T: +45 32 69 88 88 (umvegis móttøkuna á stovninum)